

Jógvan á Lakjuni granskar greinar, sum kend fólk sendu blaðnum, tá tey vóru børn



JÓN

Einaferð var tað ein lítil drongur, hann sá so neyðarligur úr, men hann var so fittur, hann var 7 ára gamal, og hann æt Jón.

Einaferð bóðu nakrir aðrir dreingir hann koma at sigla, men hann segði, at hann átti ongan bát, so segði ein annar drongur, at hann kundi læna honum ein bát, tí hann átti tríggjar bátar, og so fóru teir at sigla. Teir fóru at sigla í einum hyli, sum teir kallaðu Grunni Hylur. Men ólukkutíð, datt Jón í hylin, og hann slapp ikki upp aftur, tá tók ein annar drongu rí armin á honum, og so gruvvaði Jón upp aftur á turt og rann so til hús. Tá ið hann kom inn í køkin og segði, at hann var dottin í hylin, varð hann koyrdur í song, tí hann hevði ikki sagt, at hann fór at sigla.

Mær dámar væl Barnablaðið. Kærar heilsur.

*Jógvan á Lækjuni, 9 ár. Fuglafirði.*

**Nøkur teirra, sum skrivaðu inn til Barnablaðið, tá tey vóru børn:**

Ingi Samuelsen, 12 ár
Heðin Klein, 9 ár
Niels Nattestad, 12 ár
Páll á Reynatúgvu
Katrin Petersen, Sandur
Kim Hansen, 8 ár, Nólsoy
Elin Heinesen, 6 ár
Jóannes Ejdesgaard, 8 ár
Hjørdis Johansen, 11 ár
Jónsvein Beck, 9 ár
Bjørn Kalsø, 5 ár
Justinus Eidesgaard, 9 ár
Óluvá Zakariassen, 7 ár

# Barnablaðið fimmti ár

**Fimmti ár eru liðin síðani Barnablaðið kom út á fyrsta sinni, og í dag eru umleið helmingurin av øllum børnum, sum ganga í 1. til 7. flokki haldarar av Barnablaðnum**

BARNAMENTAN
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Í hesum sambandið hevði Bókadeild Føroya Lærarafelags bjóðað til tíðindafundar í SMS, har felagið hevur hugvekjandi framsýning um útgávurnar hesi hálvthundrað árini.

Blaðið kom út á fyrsta sinni í 1928, og var tað Mikkjal á Ryggi sum tók stig til fyrstu útgávuna. Stundum hevur útgávuvirksemið ligið á láni, men síðani 1959 er blaðið komið út við jøvnum millumbili.

Blaðið er sjálvsagt nógv broytt hesi mongu árini, bæði í sniði og skapi, og Niels Jákup Thomsen, sum hevur stjórnað blaðnum síðani 1983, sigur, at tey alla tíðina hava lagt seg eftir, at blaðið skal vera nútíðarhóskandi og spennandi hjá lesarunum. Hetta, samstundis sum at eitt av aðalmálunum við útgávuni hevur verið at fjálga um og at stimbra børnum og ungum at lesa og skriva føroyskt tilfar.

### Nýggjan blaðstjóra

Men tíðin fer við øllum, eisini blaðstjórum, og tí kunngjørdi Niels Jákup Thomsen, at nýggjur blaðstjóri nú tekur yvir, og verður tað Beinta Johannesen, sum hevur verið knýtt at blaðnum í eini 10 ár.

Beinta fekk eisini orðið, og greiddi hon frá, at tey hava stórar ætlanir fyri framman, eitt nú at gera eina heimasíðu til blaðið, umframt at skipa fyri ymiskum tiltøkum.

### Heilsan frá Mentamálaráðnum

Í sambandi við at framsýningin um Barnablaðið lat upp í dag, flutti landsstýrismaðurin í Mentamálum, Jógvan á Lakjuni, fram røðu. Har greiddi hann millum annað frá, at bæði í barnaheimi hansara og aftur nú, hann er vorðin vaksin, íkoma illstøður í syskinaflokkinum, tá avgerast skal hvør teirra skal vera haldari av Barnablaðnum.

Landsstýrismaðurin segði annars, at:

– Tað skal stórt hegni til at geva út blað til so breiðan lesaraskara sum børn og ung. Vituligt er, at tað, sum tað 8 ára gamla barnið gleðir seg til, er tann 13 ára gamli unglingin vaksin frá. Soleiðis er, og soleiðis eigur tað at vera, tí hvørt menningarstig hevur sín tørv. Eisini samtíðin, vit liva í, setur krøv bæði til innihald og snið. Evnið skal vera viðkomandi, og stílur og skap hóska til tíðarandan.

Og hann segði víðari, at hetta setur stór krøv bæði til blaðstjóra og stjórn at fylgja við, hvussu barna- og ungdómsmentanin broytist og mennist, at duga at taka ímóti broytingum, seta nýggj mál og royna nýggjar leiðir, uttan at sleppa endamálinum og tí fakliga og etiska støðinum.

– Tit eru í einara støðugari kapping við aðrar miðlar, ymisk barna- og ungdómsbløð, sjónvarp og tær mongu skráirnar á alnetinum, segði Jógvan á Lakjuni, sum eisini vísti á, at blaðið innihaldsliga er broytt gjøgnum árini.

– Tann vælkendi Baldrian, sum øll á mínum aldri uttan iva minnast aftur og hava fylgt trúliga øll barnárini, verður í 1990 tikin av skránni, og í staðin koma teknisøgur úr ævintýrheimi, segði hann og vísti á, at tað er merkisvert, at fleiri av teimum føstu teigunum hava hildið fram so at siga øll árini, tó lívgaðir upp við uppseting, litum, myndum og broyttum heiti.

– Vit mugu sanna, at hetta ber boð um, at tað eru viðurskifti, sum ættarliðini hava hildið fast við, sum eru vorðin partur av okkara mentanararvi. Talan er eitt nú um tættirnar: Børnini skriva, børnini tekna, gaman, teknirøðir, skriva mær bræv, søgur ella ævintýr og úr Bíbliuni. Henda seinasta táttin kenna vit eldru aftur undir evninum, "Latið smábørnini koma til mín", ella "Í fyrstuni var orðið".

Framsýningin í SMS kemur í hæddina, tá Barnablaðið skipar fyri stórari konsert í SMS leygardagin, har eitt nú vælumtókti gentubólkurin Poppcorn og onnur fara at framføra.



Beinta Johannesen úr Havn er nýggjur blaðstjóri

# Mentanin og vinnan eru vinir

**Tryggingarfelagið Føroyar sponsorerar nú partar av virkseminum hjá Norðurlandahúsinum**

MENTAN
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Ongin upphædd varð avdúkað, tá Tryggingarfelagið Føroyar og Norðurlandahúsið mikumorgunin skrivaðu undir stuðulsavtala, ið merkir, at tryggingarfelagið næstu tvey árini verður fíggjarligur stuðul hjá Norðurlandahúsinum.

Stjórin í Norðurlandahúsinum, Niels Halm, fegnast um stuðulsavtaluna, og vísir á, at í øðrum londum eru slíkar avtalur væl kendar, og eitt nú í grannalondum okkara er vanligt, at vinnulív og mentanarlív finna saman í tílíkum samstarvi. Og hann er somuleiðis av teirri áskoðan, at tað er gott fyri allar partar, at mentan og vinnulív finna saman.

– Tað gevur nýggjar møguleikar, at vit á henda hátt kunnu samstarva við vinnuligar fyritøkur sum Tryggingarfelagið Føroyar, ið samstundis hava áhuga í mentanini, sigur hann og leggur aftrat, at henda avtalan tó ikki bert er ein fíggjarlig avtala.

– Hetta snýr seg eisini um annað enn fíggjarligt samstarv, tí aðalmálið við avtaluni er at gera mentanina enn meira sjónliga, sigur hann og greiðir frá, at ætlanin er at brúka stuðulin til, í størri mun at profilera og marknaðarføra húsið og tiltøkini, sum húsið skipar fyri.

Niels Halm vísir í hesum sambandi á, at tað jú framvegis eru og fara at vera Norðurlandaráðið og Føroya Landsstýri, ið standa fyri høvuðsfíggingini av Norðurlandahúsinum, men at tað sjálvandi eisini hevur týdning fyri húsið, at samstarv fæst aðrar vegir, so fleiri streingir eru at spæla á.

Á tíðindafundinum kom fram, at avtalan er serlig, á tann hátt, at báðir partar vóna, at onnur við teimum taka táttin upp, so kanska fleiri aðrar líknandi avtalur fara at verða gjørdar millum føroyskt vinnulív og Norðurlandahúsið.

### Gott fyri vinnuna

Og úr Tryggingarfelagnum Føroyar verður sagt:

– Vit síggja stórar møguleikar í samstarvinum, tí í okkara eygum er Norðurlandahúsið ein spennandi og savnandi mentanarmiðdepil, ið hevur havt avgerandi týdning fyri ta menning, ið hevur verið í føroyskum mentanarlívi tey mongu seinnu árini, siga Jónsvein Simonsen og Petur Elias Petersen frá Tryggingarfelagnum Føroyar.

Eisini vísa teir á, at hetta ikki merkir at Tryggingarfelagið gevst við at stuðla ítróttini og øðrum virksemi, sum felagið vanliga hevur stuðlað.

Av fyrimunum fyri felagið kunnu annars nevnast, at felagið í onkrum førum hevur rætt til atgongumerki til tiltøk í húsinum, umframt at felagið sleppur at læna húsið eina ferð hvørt ár, til starvsfólkatiltøk og líknandi.